**TÍÐ OG TÓNAR. Tey ótamdu sekstiárini eru gátufør hjá øllum teimum mongu, sum ikki vóru fødd í hesum dragandi áratíggju. Ungar gentur lata seg í klæðir hjá mammu síni, enntá ommu síni. Tær finna trýssaraklæðir, sum tær tilkomnu, tilárskomnu konurnar goymdu í sorgblídni til minnis um rock'n roll, flower power, andaligt frælsi, síðhærdan ungdóm og 68arar, studentauppreistur, Vietnam, The Beatles og skipstroyggjur, ongan brósthaldara, trompetbuksur niðarliga um mjaðnarnar við breiðum jarnsettum belti og samhugaskógvar. Soleiðis minnist Sonne Smith tey gátuføru trýssini, tá hann var krambakallur í plátuhandlinum hjá S.H. Jacobsen í Havn**

# Tey gátuføru trýssini

TÓNLEIKUR

*Sonne Smith, tekstur*
*Birgar Johannessen, myndir*

Longsulin eftir farnari tíð hevur nú í skjótt 14 ár upp í slag savnað mong túsund fólk til samans í Ítróttarhøllini á Hálsi til tað stóra tiltakið »Aftur í 60 árini«, sum hondbóltsfelagið Neistin hevur skipað fyri øll árini. Tey gátuføru trýssini hava ekkóað millum dalar og fjøll í Føroyum, heilt vestur í Vágar, har tey eisini eru farin at skipa fyri hesum sama nostalgiska tiltaki.

Her hittast tilkomin og ung, kanska mest av tí at tey síggjast so sjáldan. Tey vilja sleppa út at dansa og stuttleika sær aftur við tónunum hjá teimum røttu trýssarabólkunum, sum í øllum stillføri royndu at herma eftir The Beatles og The Rolling Stones, Elvis Presley, Cliff Richard & The Shadows ella teimum hvør sær. Trýssaraorkestrini leggja dent á at syngja og spæla tað, sum var frammi tíðliga í trýssunum. Tað var rock'n roll og country & western og grátsøtar vísur. Tær – konurnar – minnast sítt lakkaða sátuhársnið, sínar krunkasvørtu eygnabrýr og tey síðu, væl tjøraðu eygnahárini, sínar violettu varrar og hárbondini, síni víðu, plisseraðu skjúrt og skjúrtini, sum seinni í trýssunum krupu so langt upp eftir lørunum, at tað øraði fyri dreingjunum í teimum reyðu nylonskjúrtunum við svartari flippu og teimum smølu slipsunum og teimum hættisliga spísku skónum, til teir seinni í trýssunum fóru í slimline-skúrtur við síðari flippu og viðhvørt bundu slips so breið sum turriklæði um hálsin. Teir fóru í trompetbuksur og høghælaðar skógvar ella stivlar seinast í trýssunum og nakað inn í hálvfjerðsini. Trompetsniðið helt sær líka til 1978, tá ið buksurnar aftur vórðu trongar um leggirnar. Tað vóru nakrir dreingir, ið tordu at lata hárið grógva niður á herðarnar ella síðari seint í trýssunum. Teir flestu bíðaðu, til teir vóru komnir nakað væl inn í tað næsta áratíggju, hálvfjerðsini, við at lata hárið síðkast, tí nú vóru teir fjølmentir, og so gjørdi tað ikki so nógv. Teir fáu, ið vágaðu sær at ganga við síðum hári seinast í trýssunum, vóru dreingir, sum fólk vendu sær við at síggja og ilskast inn á. Hashvrak. Kommunistar. Óargaungar. Hippiarar, ja, summi kallaðu teir »hipparar« úr Havn. Tað var ikki fyrr enn mótin gjørdist kollektivur, at tað betra slagið fór at ganga við síðum hári eisini. Tey seinnu trýssini runnu at kalla saman í eitt við tey fyrru hálvfjerðsini, og tí verða tey tíggju árini, mest fimm tey fyrstu, umrødd her í sambandi við musikkin.




*Í dag starvast Sonne Smith sum tíðindamaður á Rás 2. Í trýssunum var hann krambakallur í einum av mentadeplunum í Havn – í dagligari talu hjá SHJ. Tað var plátuhandlinum hjá S.H. Jacobsen, sum helt til har Kunningarstovan nú er*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Kraftblokkurin

Eitt av mongum sereyðkennum hesi árini vóru amerikanarabilarnir. Her koyrdu Rambler, Plymouth og Ford millum týskar Opel Kapitan og Ford Taunus og bretskar Austin og Morris og svenskar Volvo. Tey ungu vildu helst koyra í sínum egna amerikanska bili, men tað var í flestum førum ein dreymur, eitt ófáiligt ævintýr, tí hesir bilar vóru dýrir, og teir elgdu bensin í seg. For hundan, hetta vóru bilar við V8-motori, sum næstan kundu verðið settir í ein línubát. Teir flestu amerikanarabilarnir vóru hýruvognar, stationvognar, ið eisini koyrdu fasta rutu millum bygdir. Tey ungu leigaðu bil um kvøldarnar, ella rættari, teir ungu dreingirnir leigaðu bil, helst ein amerikanskan, at sigla við tíðliga og mest seint, langt út á náttina, at kasta nót eftir diddum í øðrum bygdum. Reiðskapurin var sjálvur bilurin við øllum sínum hentleikum, eitt nú kraftblokkinum. Hetta var ein plátuspælari. Sjafførurin átti allar tær populerastu singleplátur-nar við The Beatles, The Rolling Stones, Swinging Blue Jeans, Dave Clark Five, The Shadows, Buck Owens, Bobby Bare, Charley Pride, The Beach Boys, The Supremes og alt tað, sum var frammi í trýssunum. Eisini soul, ið legði støðið undir diskotekini. Undir soul komu allir soulsangararnir, ið fingu sín musikk út á Motown plátumerkinum. Motown var Motortown, sum aftur var Detroit.

Hetta var tað vanliga náttarlívið, rukkulívið, dreymurin um alt, sum kundi ganga út, bara mappan var nóg tjúkk. Eisini tá vóru flest øll ung samd um, at einki hendi, hóast tað eisini tá vóru virkin ítróttarfeløg, losjur, samkomuhús, og musikkur. Men einki hendi, søgdu tey. Tað var kavrotið, deyðkeðiligt. Alt. Gud viti, hví so mongum leingist aftur í trýssini. Helst man tað vera tí, at tey fingu ikki tað, tey droymdu um. Tey fingu tað ongantíð, hvørki tá, ella tá ið ov seint var mong ár seinni.

## Mitt í trýssunum

Eisini hetta tíðarskeiðið búðu nógvir føroyingar í Danmark, flestir í kongsins býi, Keypmannahavn. Teir lósu til okkurt. Summir gingu ta akademisku leiðina, aðrir lósu til verkfrøðing, arkitekt, tannlækna, gingu á handilsskúla og handilsháskúla ella arbeiddu hjá Carlsberg, postverkinum, lósu ræ ttlestur, og nógvir hovdu bara okkurt arbeiði ella gingu fyri einki og suttaðu upp á labbarnar. Tað vóru teir, ið komu heim aftur sum av torvheiðum við ongari útbúgving. Tað gekk ikki. Teir dumpaðu. Føroyingar. Bæði dreingir og gentur.

Nógvar ungar gentur hvurvu úr Føroyum við teimum millum ungar føroyskar dreingir hataðu mjørkadalsmonnunum. Tær giftust í Føroyum ella í Danmark við hermonnum og livdu lukkuliga ella ólukkuliga. Hip sum hap, soleiðis sum lívið nú altíð hevur verið.

Nakrar ungar gentur fóru niður at arbeiða á hotelli, hjá ríkum privatum ella okkurt fyrifallandi. Alt var betri og meiri spennandi enn í Føroyum. Og sjálvandi fóru eisini nakrar niður at lesa eins og dreingirnir.

Hesi trýssárini leivdu mangan ungan føroying í eitt kensluligt, ólukkuligt vakuum. Ei løgið at so mong stúra fyri oljuvinnuni nú á døgum.

Tað vóru eisini nógvir føroyingar í Århus og seinni fylktust nakrir í Odense, tá ið universitetið varð sett á stovn har. Uppaftur seinni gingu aðrir á RUC, Roskilde Universitetscenter. Summir komu ongantíð heim aftur. Her var einki arbeiði. Her var so provinsielt, so bygdasligt, at her tímdu teir ikki at vera.

Hetta vóru árini, tá ið musikktemplini Hithouse og Le Caroussel drógu tey ungu til sín. Her kundu tey uppliva píkatráðsorkestrini sum til dømis The Defenders, The Hitmakers, Peter Belli og hansara rivalar umframt tey mætu útlendsku orkestrini, ella bólkarnar, tó at teir kravdu víðari og størri hallir at spæla í. The Beatles vóru jú í Keypmannahavn í 1964. The Rolling Stones vóru har. Tveir tvøradreingir upplivdu Chuck Berry við sínum duckwalk og rhytm & blues. Onkur annar sá The Who sorla øll síni ljóðførir sundur í Odense, og øll lurtaðu eftir Jørgen Mylius og Hans Jørgen Skov, tá ið teir høvdu programm sum »Efter skoletid« og »Top 20«. Hetta var tíðin, tá ið so at siga øll lurtaðu eftir Radio Luxembourg, burturi og heima.



*Grand Funk Railroad – enn ein av yndisbólkunum hjá Sonna*

## Flower Power

Undan teirri tíðini, sum helst byrjaði í 1967, komu teir sonevndu mótmælissangararnir, fyrst Bob Dylan, síðani Donovan og Barry McGuire, og ein danskur avleggjari var Cæsar. Hetta bara fyri at nevna nakrar.

Flower Power tók seg



upp í San Francisco við sangarum sum til dømis Scott McKenzie og teir bretsku Eric Burdon & The Animals. Flower Powertíðin var eisini psykodeliskar upplivingar við bólkum sum Jefferson Airplain og Greatful Dead.

Hetta var ein løgin pseudotíð. Boðskapurin hjá teimum ungu, serliga poppsangarum og -bólkum, var »make love not war«, eitt syngjandi mótmæli, ein prædika fyri friði í tí miðleysa Vietnamkrígnum, tá ið tvær milliónir vietnamesarar fullu í krígnum, og 55.000 amerikanarar komu heim í líkposum. Aðrir komu heim sum lamløstað narkovrak. Teir fingu onga hetjumóttøku. Eingin vildi vita av teimum. Teir avbyrgdu seg sjálvar í krígsmarruni.



*Tey hugna sær í Havn í 1969*

## Hey Joe

Brádliga, ein dag í 1967, vóru fólk varug við ein heilt nýggjan musikk, sum hoyrdist í radio. Ein rá, talandi rødd, væl styðjað av tungum gittarspæli, einum tungum bassi og rullandi, hostandi trummuspæli fór sína sigursgongd um lond. Hetta var bólkurin The Jimi Hendrix Experience, mannaður við gittarflogvitinum Jimi Hendrix, bassistinum Noel Redding og trummusláaranum Mitch Mitchell. Jimi Hendrix og hinir báðir høvdu spælt tann gamla country & western sangin, Hey Joe, inn. Henda singleplátan var ein hornasteinur hjá teimum bólkunum, ið komu undir heitið superbólkarnir.

Tey ungu fóru at lurta eftir superbólkum. Ein teirra var Cream við Eric Clapton, Jack Bruce og Ginger Baker. Cream var so musikalskt kollveltandi, at hann hoyrdist heilt til Klaksvíkar. Her fór tað »at krima«. Og í Havn royndu nakrir seg við tónleiki hjá Cream. Helst mundi tað vera trummusláarin hjá Cream, Ginger Baker, sum var íblásturin til, at eitt nú N.S.U dundraði í onkrum dansihøli í Havn.

Cream var ein ótrúligur bólkur. Tá ið hann kom við LP'ini Disraeli Gears, uppkallað eftir tí bretska politikaranum Benjamin Disraeli (1804-1881), kollvelti hann so at siga allan poppheimin. Cream ruddaði slóð fyri øllum superbólkum eftir hetta. Bólkurin gavst tíverri longu í 1969 við konsertupptøkuni Goodbye. Teir tríggir, Eric Clapton, Jack Bruce og maðurin við junglutrummunum, Ginger Baker, søgdu sjálvir, at fullkomið anarki valdaði á pallinum, tá ið teir høvdu konsert. Tað er væl møguligt, men hetta var ið hvussu er eitt óvanliga væl skipað anarki.

Hetta var alt um somu tíð sum tá ið Pink Floyd fekk nøkur til at droyma seg burtur í einum psykodeliskum fata morgana.

## Skriðan

Millum allar LP-pláturnar við The Beatles, The Rolling Stones, Elvis Presley, Cliff Richard, The Shadows, Buck Owens, Bobby Bare, alt hetta góða gamla, sum øll kendu, uppdagaði ein krambakallur í einum radio- og plátuhandli í Havn mestsum av tilvild eina forfjónaða LP-plátu við einum amerikanskum bólki, sum eingin hevði hoyrt um fyrr her á landi. Plátan stóð einsamøll á hillini millum allar hinar kendu. Hann, krambakallurin, fór at lurta og varð varugur við, at hetta var nakað heilt annað enn tað, ið teir vóru von við. Haðani hoyrdist ein gravrustað rødd. Henda rødd var so frumkend, at hon festi seg sum ein rustaður, brúktur sjeytummangli í tonkunum. Sangarin æt John Kay, og bólkurin hjá honum æt Steppenwolf. Ja, nettupp, tað var LP'in við Born To Be Wild, Sookie Sookie og The Pusher.

Hesin plátuhandilin bilegði sínar plátur úr Danmark eftir vørulistum, ið komu frá teimum stóru altjóða plátufeløgunum EMI, Polydor, tí danska Hede Nielsen og fleiri øðrum, sum liggja í gloymskunnar havi.

Ein dagin kemur ein pakki við singleplátum inn um hurðina í handlinum. Í honum var ein pláta, hvørs A-síða æt Bad Moon Rising við tí amerikanska bólkinum Creedence Clearwater Revival. Henda sama dag komu okkara livandi poppleksikon, Birgar Johannessen og Sigurd Bech inn at vita, um tað ikki mundi vera onkur pláta, teir kundu keypa til at brúka hjá sær í tí nýstovnaða bólkinum Cream Crackers. Teir keyptu so at siga alt fyri eitt Bad Moon Rising, og so var alt Creedence Clearwater Revival eina tíð.

Her slepst ikki undan av nevna, at Birgar var ein av trimum í Havn, sum átti eitt B & O stereoanlegg, sum var eitt so flott møblastykki, at hansara vinfólk og kenningar gingu pílagrímsferð heim til hansara í Lon at síggja og hoyra Føroya flottasta útbúnað. Palisandurlokið gekk við oljutrýsti.

Heima hjá Birgari sótu ungfólk í hvørjum króki og á gólvinum í stovuni og lurtaðu eftir teirri mætastu plátuútgávuni nakrantíð, Sergeant Peppers Lonely Hearts Club Band. Onkur sat heima hjá Birgari og týddi tekstin til føroyskt, sum einki fantilsi var á:

*Vit eru sersjant pipar*
*einsamalt hjarta klub*
*band.*
*Vit hopa, tit nýta hetta*
*show.*
*Vit eru sersjant pipar*
*einsamaalt hjaaarta klub*
*band.*
*Setið tykkum niður og latið*
*kvøldið ganga ...*
*Tra-la-la-la*

*Tá ið eg blívi eldri og*
*missi mítt hár*
*nógv ár frá nú*
*tra-la-la-la*
*... følsdagsheilsan og*
*fløsku av vín.*
*Abbabørn á tínum knæ,*
*Vera, Chuck og Dave ...*

*Elskaða Rite metur genta,*
*einki kann koma imillum*
*okkum.*

*Tra-la-la-la-la-la-laaa.*
*Standandi við eitt*
*parkometur,*
*tá ið eg fekk eitt glimt av*
*Ritu,*
*tjukke-tjukke-tjukke-tju,*
*sitandi í eini sofu við eini*
*systur ella tveimum*
*waa-waa-waa-waa ...*

*Eg sá ein film í dag oh*
*drongur,*
*tann eingilski herurin*
*hevði ak'ra vunnið eitt*
*kríggj.*
*Fýra túsund hol í*
*Lancashire,*
*eg taldi tey øll ...*

Eini trý ár seinni kemur Rudolf Joensen (Gekkurin) inn í henda góða plátuhandil at hyggja, hvat er av nýggjum. Rudolf hugsaði um, hvat mundi vera av nýggjum gomlum. Altso tað, hann var vanur við. Men nú kemur krambakallurin og vísir honum húsan til eina spildurnýggja plátu við spildurnýggjum musikki: Deep Purple In Rock. Ein veldugur hátalaraútbúnaður fær alt at danda og rista í handlinum, og Rudolf sigur einki. Eingin hoyrir hann kortini.

– »Nú, hvat dámar tær?«, spyr krambakallurin, tá ið Into the Fire og Living Wreck hava blást greytin úr høvdinum á Rudolfi.

Rudolf, sum er klaksvíkingur og ivaleyst hevur hoyrt okkurt krima, svarar: »Ikki so galø.«

»Ikki so galið? Hvat billar tú tær inn. Ikki so galið, sigur tú. Hetta er rætt og slætt tað størsta og besta, sum er útkomið í fleiri ár.«

Rudolf fór av stað við plátuni, og tum skilst angraði hann tað ikki.




*Deep Purple in Rock – ein av klassikarunum frá 1970*

## Diskotek

Diskotekini tóku seg sum vant nakað seinni upp í Føroyum enn uttanlands. Tey gomlu dansistøðini vóru væl mannað, heilt frá Gágguni og The Faroe Boys til tey mongu orkestrini, sum mong ár seinni myndaðu trýssini um alt landið.

Viðhvørt komu útlendskir bólkar hendavegin. Eitt nú ein bretskur bólkur, sum æt Spiggy Topes. Hann spældi í losjuni í Havn. Spiggy Topes, seinni The Cliff Bennet's Rebellion, brúkti tvørfloytu. Hetta var sjálvandi nógv øðrvísi enn tað, vit vóru von við, og íblásturin hjá teimum í Spiggy Topes var tann bretski superbólkurin Jethro Tull við Ian Anderson, manninum í tí síða kotinum og øðrum beininum uppi undir knæ á hinum beininum.

Nú fóru vit at lurta eftir Jethro Tull og keypa pláturnar. Fyrst var tað singleplátan Living In The Past, síðani kom ein LP fyri og onnur eftir við Jethro Tull og oddamanninum Ian Anderson og hansara gandatvørfloytu.

Vit vórðu varug við Santana, serliga Fleetwood Mac-lagið Black Magic Woman. Carlos Santana er



*Eyðkenda búmerki hjá Grateful Dead – av plátuni American Beauty 1970*